## FRÁGREIÐING FRÁ LØGMANNI 1973

Fimm og tjúgu tingsetur hava vit nú lagt aftur um bak undir verandi stjórnarskipan Føroyar, og er hendan, í dag byrjar, hin fyrsta í aðru fjórðingsøld.

Skipanin er hesi fimm og tjúgu ár einki broytt, og hava allir flokkar, í tinginum sita, havt stjórnarábyrgd hesi ár, so teir menn, sum á sinni metti hana nýtiliga, hava av royndum fingið váttað meting sína.

Skal annars ikki koma inn á hesa skipan, neyðugar broytingar ella týðandi hendingar seinastu 25 árini, men meira tosa um verandi landsstýrisskeið og líta framyvir.

«Á jólum tveir partar eftir, á kyndilsmessu helvtin av hoynum um væl skal vera», so søgdu teir gomlu, og siga hesi orð nakað um, hvat neyðugt er, skal lívið ótarnað ganga víðari og nýtt setast við, og tað er, at syrgja fyri, at nógmikið er til fóðurs, og at halda hús við tí.

Verandi landsstýrisskeið er runnið fram um kyndilsmessu, og halda vit, sum í landsstýrinum sita, at tað er eydnast at fáa til vega neyðuga fóðrið av ymsum slag og hildið er soleiðis hús, at vit, áðrenn skeiðið er runnið, skuldu rokkið at loyst meginpartin av teim uppgávum, ein setti sær fyri og latið eitt búgv til metingar, sum er munandi styrkt og konsoliderað. Og hetta hóast tað, at ikki á øllum bø er so væl á sum áður, at summastaðni er ræettuliga avetið, og at ikki allir akrar okkara geva somu fold sum fyrr.

Einki av árunum 1970, 71 ella 72 hava verið rakár, øll trý hava, tá hugt verður at teim tølum, vit vanliga meta slíkt eftir, givið rættuliga væl. Tey eru í nýggjastu tíð árini, sum hava havt frægasta handilsjavna og saman við 1967 einastu, har gjaldjavnin mótvegis útheiminum hevur sýnt munandi avlop. Tølini eru at lesa í teim skjølum, hjáløgd eru, og sýna tey á øllum økjum — hvat viðvíkur íløgum og uppsparing hjá tí almenna og einstaklingi, bruttotjóðarúrtøku, útflutningi, einstaklinga úrtøku og so framvegis — munandi framgongd.

Fyrra helvt av 1973 sýnir somu mynd, og halda vit, at enn eina tíð skuldu vit kunna notið gott av tí hákonjunkturi fiskavørum hevur verið fyri.

Tó, óvissan um hetta tykist vera størri við byrjanina av hesi tingsetu, enn hon var um sama mundið í fjør.

Segði, at summir av akrum okkara lítið og einki bera sammett við fyrr, og er hetta at kunna útvega sær nóg stórt arbeiðsøki, til at eitt vaksandi skipatal kann veiða út ímóti tí, vit hava veitt, ein hin fyrsta fortreytin fyri, at fiskaprísirnir kunnu ávirka framhaldandi útbygging og konsolidering. Henda settning er torført at greiða.

Ótryggleikin í gjaldoyrisviðurskiftunum er onnur hóttanin ímóti vælferð okkara eins væl og hin vaksandi dýrtíðin, sum fær allar vørur á heimsmarknaðinum at bólgna. Hesa hóttan kunnu vit tíverri ógvuliga lítið gera við. Gjalda vit ikki veraldarmarknaðarprísin fyri nýtslu okkara, fáa vit ongar vørur — serliga tí mangar teirra ikki eru til í nóg stórari nøgd — og at gera skil á gjaldoyrisviðurskiftunum stórlandanna millum býður væl sjálvt ikki hin mest hugdjarvi og knássaligi føroyingurin ikki til. Her kunnu vit bert vóna, at menn hava lært somikið av teim kreppum, sum slíkir ótryggleikar ofta eru endaðir við, at teir nýta verandi og skapa tørvandi fíggjartól til at benda gongdini burtur frá teim áum, gjáum og fjallarustum, sum eru mark millum gróðraríka og skapandi tíð og niðurbrótandi neyðartíð.

Onkur røddin hevur longu ljóðað, at um slíkur ótryggleiki veruliga er úti í stóru verð, so er tað ikki skilamannaverk at leggja so nógv fyri, sum føroyingar og føroyska samfelagið hava gjørt seinnu árini.

Tá átti fíggjarlig konsolidering at farið fram, við at meir varð sett á grunnar, í bankar og lagt á kistubotn. Men hetta er ikki ígjøgnumhugsað tala, tí júst við nú at loysa flest møguligar av teim uppgávum, sum ligið hava á láni, tryggja vit okkum, at íløgurnar verða gjørdar í virðisføst gøgn, sum eitt minkað peningavirði ikki er ført fyri seinni at skapa. Samstundis skulu vit á grunnum og á kistubotni hava nóg mikið til at standast kann ímóti um neyðugt verður at halda aftur, ella um innløgukeldur fyribils renna spakuligari.

Sjálvur vænti eg ikki, at menn seta slíka kós, at vandi er fyri heimsumfatandi kreppu, og dugi eg tí ikki at síggja beinari, enn at vit framhaldandi skulu royna at halda hampuliga javnvág millum eina munagóða samfelagsútbygging við tryggjan av vælferð manna og eina líkinda trygd fyri orku landskassans til versnandi tíðir. Fyri vist vita vit, at okkara samfelag altíð kemur at vera fyri broytingum í umstøðum og innløgumøguleikum.

**Sjóvinnan**

Innan sjóvinnuna eru tveir meginspurningar. Hin fyrri um vit framhaldandi kunnu endurnýggja og útbyggja skipaflota okkara, soleiðis at vit altíð hava tey mest nútímans og kappingarføru skipini, og hin seinni,

um tað verður møguligt at útvega hesum skipum veiðurættindi í slíkan mun, at fíggjarliga grundarlagið undir rakstri teirra framvegis er í lagi.

Henda spurning vendi eg partvís aftur til undir viðgerðini av fiskimarks- og fiskirættindamálunum.

Hugurin at byggja nýggj og at keypa nýtilig brúkt før er einki linkaður. Uttan studning ella veðhald keypa menn framvegis før, sum ikki eru nýbygd, og játtaður er studningur og partvís veðhald til hópin av skipum, sum verða bygd lutvíst í Føroyum, men annars yvirhøvur í Noregi, Danmark og Onglandi.

Talan er um eina byggiætlan frá 1. juli 1973 og hálvtannað til tvey ár fram í tíðina uppá umleið 160 mill. kr.

Harav er endaliga treytaleys tilsøgn givin frá almennari síðu uppá bygging fyri 102 mill. kr., og havandi í huga, at vit í næstum helst skuldu fingið í lag bygging av6-8 skipum á føroyskum smiðjum, umframt tær útlendsku byggingarnar, sum enn ikki eru liðugt viðgjørdar, so verður henda ætlan at ganga út.

Almenna studningsveitanin til hesa bygging verður umleið 35 mill. kr. ella útvið eins nógv, sum frammanundan stendur í óavskrivaðum studningslánum.

Grunnurin til endurnýggjan skipaflotans hevur tøkar 20 mill. kr., og á fíggjarlógaruppskotið 74/75 eru settar 9,5 mill. kr.; hartil verður nakað avsett í 75/76, so hitt almenna greiðir sín part av uppgávuni. Men saman við teim munandi avskrivingarmøguleikum — t.v.s. útsetingarmøguleikum við skattgjaldan og skattalættanum, sum liggur í at menn sleppa at javna inntøkurnar við avskriving — verður hetta eitt tungt tak fyri landskassan og harvið fyri skattgjaldaran, serliga nú so stórur partur av meðalinntøkufólki luttekur í hesum skipaíløgum sum partsreiðarar.

Landsstýrið gjørdi fyri tveimum árum síðani vart við, at lítil orsøk var til at bera ótta fyri, at ílegging í veiðufør bleiv so lítið lokkandi, at menn góvust við at byggja, og legði fram ymisk uppskot, sum skuldu tryggja javnt lag — javna rytmu — í skipabyggingini:

Tey vóru:

1) Avmarkan í forhondsavskrivingini í byggitíðini, men sum heild bøttir avskrivingarmøguleikar í rakstrartíðini.
2) Møguleiki fyri at veita lagalig studningslán ístaðin fyri studning, serliga tá bygt bleiv í útlondum, og byggiharrin var kommanditt-felag.

Tingið róði her ikki í sama borði burtursæð frá, at tiltøk vóru framd, ið — sum gott var — tóku fyrimunir kommanditfelaganna. Tvørturímóti hækkaði tingið bæði studning og forhondsavskriving sammett við uppskot

landsstýrisins og noktaði fyri at umskipa sokallaðu studningsláninì til lagalig lán.

Orsøk er eingin til kjak um, hvat beint var fyri tveimum árum síðani, men heldur um, ikki er beint at hugsa eitt sindur um at tátta í — serliga uttanlanda — tá so nógvir sáttmálar eru undir landi.

Mett hevur verið, at ein bygging uppá 40-50 mill. kr. árliga er hóskandi endurnýgging innan skipaflota okkara, og sum nevnt liggja vit eina helvt omanfyri hetta komandi tvey árini, og vit vita, at enn eru ikki allir byggihugaðir frammøttir.

Tað er stimbrandi, at íleggingarhugurin er so stórur her á landi. Tað ber boð um, at menn meta hesar klettar verdar at dvølja á, og arbeiðarin og inntøkumaðurin á landi so væl sum fiskimaðurin og skiparin, sum investera við skattastuðli og beinleiðis almennum studningi, kunnu siga við kenda fyrrverandi tingmanninum: «Føð tú meg íár, eg skal føða teg at ári». Men ein meginvansin er kortini, at føroyskar skipasmiðjur eiga ov fáar av hesum sáttmálum.

Landsstýrið hevur leingi arbeitt við málinum um at fáa til vega neyðuga fíggjan til byggingar í Føroyum, har sum Realkreditstovnurin ikki hevur kunnað ella viljað rokkið. Ymisk tilboð hava verið frammi, men hava byggihugaðir ikki tikið av.

Støðan er rættuliga gjølla lýst í teirri meting — analysu — landsstýrið hevur fingið til vega; hon er hjáløgd sum skjal.

Landsstýrið vil í hesi tingsetuni seta uppskot fram um ymisk ískoyti til lóggávuna um endurreising av føroyskum skipasmiðjum, soleiðis at bøtt verður um støðuna viðvíkjandi bygging í Føroyum, m.a. uppskot um at taka upp puljulán uttanlanda. Men var ikki vert samstundis at broytt studningsveitanina so, at munurin á studninginum við bygging uttanlanda og í Føroyum gjørdist størri, t.d. so at framhaldandi verða studningslán uppá 25% veitt til bygging í Føroyum meðan stuðulin við bygging uttanlanda verður 15% lagalig langfreistað rentulág lán.

«Ikki grør um tann stein, sum ofta verður fluttur» kann sigast sum verja ímóti at broyta umstøðurnar fyri íløgum á veiðusíðuni, men her hevur lítið verið flutt, og full semja er um, at almennur stuðul er fyri neyðini, men spurningurin er, um ikki meira av hesum stuðli skal leggjast uppá land, tí «ikki batar at fylla alt í annan leypin, so dettur av».

Tey skipasløg ætlanin er at byggja og keypa eru:

| | |
|---|---|
| 10-12 | ídnaðarfiskiskip (svartkjaft og annan ídnaðarfisk) |
| 3-4 | nótaskip (í einstøkum førum nóta- og trolskip) |
| 10-12 | línuskip (ísfisk til flakavirki) |
| 2-3 | reyðutrolarar (frystiskip) |
| 1 | saltfiskatrolara |

2 120 tons ísfiskatrolarar (til flakavirki)
9 ísfiska- og ídnaðartrolarar (flaka- og mjølvirki)
Harafturat nøkur smærri deksfør til útróður.

Tann fjølláttan, sum fram er farin innan fiskivinnu okkara seinnu árini, stendur alsamt við, og er hetta ein hin besta trygdin fyri, at vit í longdini fáa mest burturúr.

Tær leiðir, hesi skip eru ætlað at troyta, eru fyri ógvuliga lítlan part føroyaleiðirnar eina. Hetta sigur okkum nakað um met teirra, sum saman við almenninginum leggja rygg til at tryggja okkum úrkomuna.

Annars er ymiskt at gera á hesum leiðum.

Eitt ávíst mílnatal sum fiskimark er eingin treyt fyri longu nú at troyta okkara egnu ríkidømi munandi meir.

Samfelagið má orka at kanna hetta økið frá minsta plinki til frægastu mið, úr fjøruni og út á djúpastu rennu, og frá hellingini niður í dýpið og inn yvir landgrunnin allan.

Royndirnar eftir svartkjafti og vitanin um líkindini fyri munandi trolveiðu eftir upsa, so væl sum skeljafiskiskapurin, laksafiskiskapurin, hummaraveiðan og fiskaalingin geva øll lyfti um, at heima er nakað at vinna fyri tað, sum avmarkingar burturi taka, og hetta heilt uttan mun til spurningin um fiskimark.

Hvat kann trolingin, sum íár gevur 5000 tons, í longdini geva? Og hvussu nógv tora vit at loyva?

Alt hetta mugu vit vita og kanna undir strongum reglum og eftirliti, og hann, sum reglurnar brýtur, hevur — um ikki sítt lív — so uttan grið sítt loyvi forbrotið.

At læra at kenna sítt egna øki eins væl og sjálvan seg er meginsetningur. Við honum greiddum ber eisini til at taka rættastu støðuna í sjómarksspurninginum.

**Ídnaðarútbyggingin.**

«Mangur er páskafriggjari, sum ikki var jólafriggjari», men í spurninginum um ídnaðarútbygging sær nú út sum allir menn kappast um at vera við til at tryggja einum vaksandi ídnaði hampulig kor her á landi.

At ídnaðarútbyggingin skal taka dik á seg í sjeytiárunum stóð okkum leingi greitt, og at hon, áðrenn triðingsskeið er runnið, longu hevur fingið føtur undir seg, kann bert frøa, og má sigast at vera meir enn vónast kundi í 1970.

Møguleikarnir fyri fígging eru bøttir ígjøgnum ymsa lóggávu og við størri íløgging frá tí almenna, samstundis eru framd ymisk tiltøk til at stimbra eini betri fatan av ídnaði, hetta hevur vaksið um hugin at fara undir ymsa framleiðslu. Ikki bert innan fiskaídnaðin henda støðugt íløgur í nýggj virki, meðan eldri verða nútíðmansgjørd, men eisini annan ídnað leggja menn seg eftir at fáa í lag.

Støðið undir hesum er ikki bert fíggjan, men eisini útbúgving til leiðslu og arbeiði innan ídnað og hartil ikki minst at eiga ta fullkomu kanningar- og metingarorkuna, sum skal viðgera tey projektir, menn hava áhuga fyri,

Tey útbúgvingartiltøk, sum higartil hava verið gjørd — skeiðvirksemi og onnur skúling — hava tikið seg væl upp, men neyðugt er framvegis at vera á varðhaldi, so besta grundútbúgvingin kann gevast.

Havi fyrr sagt, at hóast íløguspurningurin innan ídnað er tungur at loysa, so letur hann seg loysa, og enn eru valla skilagóð projektir deyð í egginum vegna tørvandi fíggjan.

Hin spurningurin um at fáa til vega so væl grundaðar ætlanir, at teim er lív lagað, er enn truplari at loysa, tí hann loysist ikki við peningi eina. Her skal vitan, áhaldni og dugnaskapur til, ikki bert til at duga at leggja monnum lag á, og rætta teim hond í kanningini, men eisini til at duga at loysa úr lagdi nógv av tí, sum í kvinnum og monnum bylgist, men sum tey ikki rættuliga duga at slætta gøtuna fyri sjálvi. Hugmyndagávur — fantasi — mugu eisini leggjast afturat vitan og dugnaskapi, skal nakað av tí nógva, sum uttan iva kann framleiðst her á landi, verunliga skapast.

Av íløgumøguleikum skulu nevnast:

1) Lán frá ídnaðargrunninum
2) Lán og stuðul frá danska egnsútviklingsgrunninum
3) Lán og stuðul frá menningargrunninum
4) Smærri ídnaðarlán við landskassaveðhaldi
5) Landsstýrisins studningur til ídnaðarfremjandi endamál
6) Bankafíggjan, og hartil arbeiðir
7) landsstýrið í løtuni fyri at fáa til vega eina grundfíggjan (1. ella 2. prioritetsfíggjan) sum skal virka saman við ella framman fyri hinar nevndu fíggjanarhættir — serliga ídnaðargrunni og egnsútviklings-grunni — annaðhvørt úr einum sjálvstøðugum grunni ella løgd saman við onkrum av verandi stovnum.

Tað er skilligt, at við hesum mongu íløgumøguleikum er tørvur á samskipan, soleiðis at teir ymsu grunnar í summum førum virka saman innan sama øki og í øðrum luta uppgávurnar sínamillum.

Eisini á planleggingar- og kanningarøkinum er brúk fyri samskipan, tí

sum er, virkar ídnaðarfelagsstovnurin sum privatur ráðgevari, goldin fyri mesta partin av landinum, meðan landið sjálvt og ídnaðargrunnurin troyta annan serkunnleika umframt henda privata.

Uttan eina miðsavnan av bæði ráðgevara- og kanningarsíðuni so væl sum fíggjarsíðuni, er vandi fyri, at tey, sum skulu gera nýtslu av hesum, fløkjast í teim ymsu møguleikum.

Sjálvsagt er eisini ein uppgáva hjá tí almenna og teim ymsu stovnunum at gera vart við teir møguleikar, sum finnast, og í heila takið at royna at leita fram tey øki — og skapa áhuga fyri teim — har møguligt er í Føroyum at fara undir skapandi virksemi. T.d. eru menn í fleiri førum komnir eftir, at samvinna við útlendskar fyritøkur er ein gongd leið — ja í summum førum ein neyðug leið, skal framleiðslan eiga nóg stóran og góðan marknað og nóg góðar søluleiðir.

Ein uppgávan hjá teim, sum byggja skip uttanlands, er at seta sum treyt, at alt tilhoyr, sum gerast kann í Føroyum, eigur at verða gjørt her. Landsstýrið hevur sagt útlendskum skipasmiðjum frá hesi treyt, men byggiharrarnir mugu gera vart við, hvat av føroyskari framleiðslu møguligt er at fáa.

Tað er tungt at bróta upp úr nýggjum, sum talan er um innan ídnað, og bakkastini verða mong.

Sum gjølla umrøtt í fjør, høvdu vit slík innan ta vinnu, so nógvar vónir eru knýttar at, skipasmiðjuvinnuni.

Hon var nærum komin heilt undir bonkin, og hevur verið neyðugt við stórum almennum íløgum, skal hon bjargast, og enn er nakað eftir á mál.

Skála Skipasmiðja lat seinasta nýbyggning sín í juni í ár og hevur tveir sáttmálar um at gera lidnar ídnaðartrolarar, og hon stendur nú fyri fyrsta dagin at fáa sáttmála um 1 ella 2 nótaskip, so her tykist at lýsa í.

Stytri er komið ávegis í Vestmanna, sum lat seinasta útróðrarbátin í december 1972, har hevur felagið enn ikki funnið sær køna leiðslu, og har eru útbyggingaruppskotini enn ikki liðug.

Landsstýrið hevur latið upp í hendurnar á serkønum at koma við uppskoti um neyðuga útbygging, og verður hetta væntandi liðugt heilt skjótt, eftir verður so at tryggja virkinum nakrar sáttmálar. Uppskot landsstýrisins undir viðgerðini av skipasmiðjukreppuni um at skipa ein sáttmálastovn kemur her aftur upp í tíðina, og vil landsstýrið nú heita á tingið um at taka støðu til henda stovn, soleiðis sum samtyktin í vetur segði frá.

Soleiðis sum prísbólgnanin á veraldarmarknaðinum heldur fram, er meira enn fyrr neyðugt at verja seg við at royna at gera framleiðslu her á landi bíligari. Vit vita, at byggitilfar og serliga viður dýrkar munandi, tí skuldu tær hugsanir, sum eru frammi viðvíkjandi framleiðslu av isoleraðum elementum úr betong liðug til uppsetingar í samband við ætlanina

um at fáa sett upp cementvirki, sum tekur cement heim í bulklast til pakkingar her, haft størsta áhuga.

Eisini ætlanin um at framleiða neyðuga pakkitilfarið til alla føroyska framleiðslu herheima má elva til, at ein kýtir seg at fáa uppgávuna loysta.

Annars liggja fyri nógvar meira og minni realistiskar ætlanir, sum sýna, at áhugin er stórur. At nevna tær her verður ov drúgført, men vit mugu orka at viðgera tær allar, tí sum eg fyrr havi nevnt, fyri hvørja ferð vit kanna og viðgera tíggju ætlanir, er kanska ein, sum førast kann út í lívið til stimbran og menningar av føroyskum búskapi.

Ein spurningur, sum í seinastuni hevur volt nakað av trupulleikum innan summi ídnaðarvirki, eru markini millum teir ymsu fakligu felagsskapir. Hesin spurningur er loystur aðrastaðni, har nýtsla í størri mun av maskinorku náttúrliga hevur ført við sær, at menn, sum ikki eru fult útbúnir handverkarar, men heldur ikki gera vanligt arbeiðsmannaarbeiði eins og taka sær av einum serligum øki innan framleiðsluna.

Hóast ein skuldi hildið, at arbeiðara- og handverkarafeløg okkara eins væl og arbeiðsgevarar okkara, sum øll hava somu áhugamál at verja, lættliga skuldu kunna drigið eina línu her, sær út sum sundurlyndi fær loyvi til at leggja eina køvandi hond á nakrar ídnaðarroyndir.

Tað er demokratiski rættur arbeiðara- og arbeiðsgevarafelaganna at togast um hesar spurningar og finna loysn, men gera tey ikki tað, so vil samfelagið ikki tola ella finna seg í, at tann útbygging, sum vit øll vita er neyðug, fyri at eitt vaksandi tal av føroyskum kvinnum og monnum skal kunna støðast her, verður darvað.

Tá má samfelagið medvirka til eina loysn ella skera ígjøgnum, so samfelagsáhugamálini verða vard.

**Landbúnaður**

Innan landbúnaðin henda ymisk framstig og nýskapanir, hóast sigast kann, at stórur partur av dyrkaðu jørð okkara ikki kemur til fulla nýtslu. Hetta leggur hvør tann til merkis, sum sær teir mongu óslignu teigar, og tær mongu traðir, ið nú verða nýttar til seyðatraðir eina. Her á landi verður tí ikki framleitt tað, sum ein vælskipað rationaliserað vinna seruliga kundi framleitt.

At tíðin er runnin frá smábrúkum sum framleiðandi táttur er eyðgreitt, tó hevur tað í mongum føri stóran hugmennandi og sálarrøkjandi týdning, at menn í fríløtum kunnu takast við eitt sindur av búnaðarskapi; men skal búnaðarframleiðslan framvegis vera ein grundstuðul í búskapi okkara, má skipast so fyri, at teir, sum veruliga skulu hava sína ársvinnu innan

henda hátt, fáa møguleika at reka brúk av hóskandi støðd ella fáa tikið sær um reiggj og í størri mun enn fyrr nýta fyrimunirnar av felagsrakstri og eini líkinda organisatión.

Hesin aldargamli vinnuvegur og lívsháttur er tó her, sum aðrastaðni, so bundin av siðvenju — tradition — og hugsan um, at hvør skal greiða sítt, sæta sær og skipa sínum, at ógvuliga spakuliga verður tikið við neyðugum broytingum í tíðini, soleiðis at har handakraftin ikki røkkur longur at loysa uppgávurnar, og mekaniseringin av hvørjum brúki sær gerst ov kostnaðarmikil, má skilagóð samvinna um maskinorku, víðari viðgerð av framleiðsluni, innkeyp og sølu koma í staðin.

Frá almennari síðu verður stuðlað munandi. Landbúnaðargreinin á fíggjarlógaruppskotinum komandi er 2½ mill. kr. umframt 1¼ mill. kr. til útskifting og matrikulering ella 3¾ mill. kr. samanlagt.

Tað eru teir vanligu studningarnir til mjólkaframleiðslu, íløgur, seyðaroyndir o.a. sum vaksnir eru.

Ífjør tók løgtingið ikki undir við tilmæli landsstýrisins um at seta pening av til keyp av uttanbýggjajørð — har slík kann fáast uttan serliga prískapping við einstaklingar — hetta ynski fer landsstýrið at seta fram einaferð enn, og vónandi verður undirtøkan betur.

Royndirnar í vakstrarhúsinum, í fjør varð bygt, hava heppnast óføra væl, tær sýna, at í Føroyum ber væl til at framleiða ymiskt grønmeti — tomatir, agurkir o.a. — sum til góðsku er betri enn tað, innflutt verður, og sum er kappingarført í prísi. Hesar royndir fara at halda fram við øðrum urtum og blómusløgum, og ivast teir, sum standa fyri, ikki í, at á hesum øki ber til at fáa eina eftir føroyskum viðurskiftum munandi framleiðslu ástovnsetta.

Takið verður at fáa menn at taka eftir, gera teir tað, skuldi samfelagið spart hóp av peningi, sum nú fer út av landinum, og nógvar familjur átt vælønta ársvinnu.

Mjólkaframleiðslan og eggjaframleiðslan er seinnu árini vaksin munandi, men serliga hvat eggjaframleiðsluni viðvíkur er torført at vera kappingarførir, vinningur sølumanna er størri við sølu av útlendskari vøru, og darvar hetta nakað; hetta kundi vit kanska bøtt um við at ansa eftir, at vinningurin procentliga skal vera hin sami.

Hvat framleiðsluni viðvíkur annars, er á hesum økinum soleiðis, at tølini koma nakað seint fram. Tjóðarroknskapurin fyri 1971, sum lagdur er hjá sum skjal, er nýggjasta taltilfar, og hann sýnir, at av bruttofaktorinntøkuni uppá 674 mill. kr. eigur landbunaðurin 16,7 mill. kr. ella umleið 2,5 %. Hann telur nakað tað sama sum fluttningur, skipaferðsla, telefon- og postverk og ravmagnsverk.

Annars eru føroyskir búnaðarmenn fyrstu ferð í nýggjari tíð nú fyri tí, at fáa hampuligar prísir fyri partar av framleiðsluni, tí veraldarprísirnir

hækka, og útflutningsstuðningurin manga staðni minkar; hetta gongur út yvir føroyska brúkaran, sum gjalda skal m.a. teir hækkandi fóðurprísir.

Í tølunum fyri 1972 og 1973 kemur hetta hóast alt at sýna seg sum vøkstur innan búnaðarøkið. Ávirkanin á prísirnar er sum fyrr nevnt avmarkað, men møguliga kunnu vit umhugsa at framleiða meira av fóðri herheima.

Skal meira av føroyskari vøru seljast, nú umstøðurnar batna, má góðskan eisini vera í lagi. Til at tryggja brúkarunum hetta setur hitt almenna á stovn føðivørueftirlit í samband við biologisku starvsstovuna. Í hetta arbeiðið verður næsta fíggjarár settur djóralækni afturat.

Annars er, sum nevnt bleiv seinasta ár, framvegis landsstýrisins politikkur at royna at varðveita hvørt búpláss og at gera umstøðurnar har so liviligar sum gjørligt bæði hvat kommunikatión og arbeiðsumstøðum viðvíkur. Í hesum sambandi eru umstøður landbúnaðarins av størsta týdningi.

## Sosiala økið

Tá lagt verður til brots fyri at tryggja samfelagsborgarunum toluliga jøvn viðurskifti ella í hvussu er eitt minsta mark av lívd, stinga seg ofta trupulleikar upp, og tað kemur fram, at alt gerst ikki í einum. Verkið má oftast — og náttúrigt fremjast í stigum.

Heilsustovnar landsins, hvørt vit hugsa um sjúkhús ella aðrar, hava verið fyri stórum broytingum og útbyggingum gjøgnum árini, og væl er rokkið framá. Men støðugt er neyðugt at byggja, skulu vit kunna møta teim krøvum, sett verða til hesar stovnar. Hesi vaksa ávirkað av umstøðunum uttanífrá og so hvørt, orka okkara økist, og eingin sleppur at skuka sær undan.

Ein av broytingunum er tørvurin á at veita nóg góða serhjálp, at fáa sett læknar og onnur, neyðug eru, skulu heilsustovnarnir røkja uppgávu sína til lítar.

Tað hevur verið — og er støðugt — alt annað enn lætt at fáa hendur á teim læknum okkum tørva. Á landssjúkrahúsinum hevur verið toluligt, men aftur í september verður eingin eygnalækni í Føroyum. Í Suðuroynni og í Norðoyggjum hevur verið trupult at fáa læknar at støðast, og á ymsum øðrum økjum hevur skortað serlæknahjálp.

Men landsstýrið leggur stóran dent á at fáa loyst hesar spurningar, t.d. verður nú roynt at leggja ortopedisku viðgerðina í fasta legu.

Sum fráboðað í løgmansrøðuni í fjør, hevur landsstýrið avgjørt at farast skal undir bygging afturat sjúkrahúsunum á Tvøroyri og í Klaksvík, so hesi kunnu veita eldri og brekaðum nóg góða pleyguviðgerð. Byggingin á Tvøroyri er mett at kunna byrja 1. november og tann í Klaksvík einaferð næsta ár.

Pleyguheimið í Eysturoynni er styttri ávegis komið, men ætlan landsstýrisins er ikki, at hvør av hesum bygginguni skulu bíða eftir aðrari, soleiðis at bygt verður so hvørt peningur kemur í pleyguheimsgrunnin. Landsstýrið arbeiðir fyri at fáa til vega neyðuga fíggjan, so byggingarnar kunnu fara í gongd, so hvørt praktisku fyrireikingarnar eru loknar.

Umsorganin fyri teim evnaveiku hevur verið sera nógv umtalað serliga aftaná byggisteðgin á stashospitalinum. Eftir drúgvar samráðingar við ríkismyndugleikarnar er nú avgjørt, at byggingin skal takast upp aftur so skjótt sum til ber, og fáa vit tá møguleikar fyri at viðgera herheima enn fleiri enn tey 31 evnaveiku, sum nú eru heimkomin. Mál landsstýrisins, at øll umsorgan av ands- og sálarveikum skal vera í Føroyum er soleiðis komið nærri.

Specialskúlin er projekteraður so langt ávegis, at landsstýrið á ólavsøku kann leggja projektið fyri tingið til góðkenningar. Í hesum sambandi verður ein týðandi tørvur loystur, tí umstøðurnar, sum nú eru at undirvísa undir, eru vánaligar.

Batin, sum fingin er í forsorgini av evnaveikum við deildini á statssjúkrahúsinum og specialskúlabyggingini, fær enn meira virði, tá nú verkstaður er í býnum, sum kann taka bæði tey á stovnum og tey, sum búgva heima, til arbeiðis.

Enn er bústaðarspurningurin hjá parti av hesum fólki eftir at loysa. At fáa bygt eitt sonevnt «avlastningsheim» má umhugsast.

Sjálvt um umsitingin av forsorgini er skipað undir Storstrømsøkinum, her eru samráðingar tiknar upp við myndugleikarnar um at fáa skipað Føroyar sum eitt serstakt øki.

Í vár samtykti tingið hækkan av teim sosialu pensiónunum við 15 % frá 1. oktober 1972, og í heila takið hevur áherðsla verið løgd á, at hava pensiónirnar nøkudunda í somu hædd sum niðri, men svarandi til føroysk viðurskifti.

Hvussu væl ein roynir at leggja til rættis á hesum øki, verður ongantíð so, at ikki atfinningar kunnu gerast, ofta eru tær grundaðar á fíggjarumstøður, men meir enn so eisini á umsitingarorsøkir.

Síðar sosialu lógirnar seinast vóru til viðgerðar í tinginum, hevur landsstýrið samráðst við statin um at skipa umsitingina av sosialmálum í ein føroyskan stovn, ístaðin fyri, at hon nú liggur fyri mesta partin hjá ríkisumboðnum og lutvíst hjá landsstýri og kommunalum myndugleikum.

Tað er greitt at fara undir hesa umskipan, um vit sjálvir taka støðu til at gera tað. Mær tykir tað rímiligt, at tað eru vit sjálvir, sum umsita hesi mál, sjálvandi við tí fyri eyga, at ein samskipan fæst í lag, sum kann geva fólki betri og lættari atstøður at søkja sær hjálp og kunnleika.

Tað er stór misskiljing, tá talað verður um, at ein slík yvirflyting ber í sær yvirtøku av kostnaðinum av sosialu veitingunum. Sjálv umsitingin

kostar bert ein brotspart — 600 — 700.000 kr. – av allari sosialforsorgini, sum nú liggur um 68 mill. kr., og hvat er náttúrligari enn at hesar umsitingarútreiðslur verða bornar í felag við sama procentbýti sum sosialu útreiðslurnar annars.

Spurningurin um arbeiðsloysistrygd hava vit enn ikki loyst. Tíbetur er í løtuni nærum allastaðni í landinum væl av arbeiði, og er hetta ikki minst teim risastóru almennu íløgunum fyri at takka, men at tað í løtuni liggur toluliga fyri, sleppur okkum ikki undan at hugsa um arbeiðsloysisspurningin. Hjá okkum, har fólkið vinnur partvís uppi á landi og partvís innan sjóvinnu, er hesin spurningur serliga trupul at loysa.

**Rúsdrekkalóggávan**

Av sosialari náttúru eru mangir av vansunum, sum standast av rúsdrekka.

Uppskot til nýggja lóg er samtykt og skal til fólkaatkvøðu.

Ætlan landsstýrisins var at fáa skipað hesi viðurskifti í fastari legu og miðaði uppskotið ímóti hesum.

Tingið broytti uppskotið nakað, m.a. var serliga greinin um felagsvirksemi strokin. Hetta gjørdi — eftir meting landsstýrisins – lógina nakað veikari, men fatan mín er ikki, at søla av rúsandi løgi nú verður loyvd í feløgum.

Tvørturímóti verður – um lógin fær meiriluta fyri sær – bert loyvt einkarsøluni at selja slíkan løg. Tí er framvegis hugsan mín, at í lógaruppskotinum liggur ein munandi bati, og liggja møguleikar fyri at hava eftirlit við umfarinum av rúsdrekka.

Støðan, sum valdar í dag, heldur í hvussu er ikki í longdini.

Tað er ætlan landsstýrisins áðrenn atkvøðuna at leggja til kunnleika veljaranna uppskotið til ta reglugerð, sum skal galda, um lógin verður samtykt.

**Samferðslan**

Teir «tápuligu» gomlu menn, eg tosaði um í fjør í sambandi við fittu søgu Mao's um at flyta fjøll, arbeiða í dag innan ein veruligan ídnað.

Samferðsluútbyggingin, bæði hvat bygging av vegum, lendingum og havnum, telekommunikatión og strandfarasigling viðvíkur, er í dag rættuliga mekaniserað, og krevur hon væl av kønum fólki, tó í tali valla fleiri enn áður, hóast stórarbeiðini, ið framd verða ísenn, eru margfaldaði.

Landsstýrið og løgtingið hava nýtt høvið, tær hampuliga góðu inntøkurnar hava givið, til at vaksa munandi um játtaninir til samferðslumál, eins

og lániheimildirnar eru øktar óvanliga nógv, og landið hevur tí sett ígongd og veitt sær amboð til at fáa frá hondini so stóra arbeiðsnøgd, sum fáur hevði droymt um fyri bert trimum árum síðani.

Í hvørjari oyggj og hvørjari sýslu verða framdar meginútbyggingar, tær flestu vóru havdar á máli í fjør. Umframt koma nú tey bæði stórarbeiðini, sum sagt var at landsstýrið vildi økja settningin við, nevniliga tunnel og brúgvasambandið Streymnes - Skálabotn og sambandið um Hvannasund. Fíggjarspurningarnir eru so langt greiddir, at byrjast kann uppá bæði hesi arbeiði seint í summar ella tíðliga í heyst, men hetta setir sjálvandi hørð krøv til maskinorku og arbeiðsleiðslukapacitet landsins, sum hevði rættuliga strangan fyrisettning frammanundan.

Uppskot um uppískoytishavnaætlan er lagt fyri tingið, tað er vón landsstýrisins, at hetta kann samtykkjast í august, tí mong arbeiði steðga eftir hesi avgerð.

Ætlan landsstýrisins er — saman við tingsins havna- og veganevnd — í komandi tingsetu at gera uppskot til eina fimm ára ætlan fyri bygdahavnir, sum ikki eru við í sjálvari havnaætlanini. Harvið kann henda útbygging fáast í fasta legu.

Skal ikki troytta við at taka fram stórt tal av byggingum, bert nevna, at útlit er til at finna hampuliga loysn á spurninginum viðvíkjandi havnaarbeiðinum í Skopun, sum er av eini serligari og torførari náttúru.

Automatiseringin av telefonsambandinum gongur væl framá, og eru fleiri meginøki samanbundin. Seinnu helvt av hesum ári koma nøkur afturat og fleiri næsta ár. Tann ætlan, sum framløgd var fyri tveimum árum síðani, sýnist stórt sæð at halda.

Strandferðslan arbeiðir í dag meira enn fyrr, og ruturnar eru munandi tættari, men mong av førum hennara eru longu gomul. Vøksturin í bilflutninginum ger, at skipini eldast skjótari og má tí umhugsast at fáa til vega meira tíðarhóskandi skip til nakrar av rutunum, millum annað til suðuroyarsiglingina, sum er hin drúgvasta leiðin, og hon sum krevur mest av ferðafólkunum.

Innan tey trý meginøkini landsverkfrøðingsstovnin, telefonverkið og strandferðsluna hevur landsstýrið í løtuni serfrøðingar í arbeiði, sum kanna, um rationalisering av umsiting, arbeiðsgongd og tólum kann lætta okkum nakað um, tað sama er galdandi sjálva landsumsitingina og deildir hennara.

Hetta kanningararbeiðið er neyðugt eisini tí, at vit ikki leingi afturat sleppa undan at lata stórar partar av arbeiðinum innan hesar stovnar dataviðgera elektroniskt.

Í samband við viðgerðina av landsstýrismálum í vár gav og tinginum

rættuliga gjølliga frágreiðing í flogvallarspurninginum, skal til hesuferð bert endurtaka tað, sum frásagt er í útvarpi og bløðum, at stjórnin hevur givið avgerandi lyfti um, at arbeiðið í flogvallarnevndini skal vera liðugt í hesum ári. Endalig støða til meginflogvøllin í Føroyum kann so takast, áðrenn henda tingseta er liðug.

**Útvarpshús og fjarsýni**

Byggjan av húsi til Útvarpið hevur leingi verið umhugsað, og tá hetta ikki er komið í lag, so er orsøkin at byggiøkisspurningurin enn ikki er greiddur.

Hvat fjarsýninum viðvíkur, so er hetta arbeiði í gongd sambært samtykt løgtingsins í seinastu tingsetu.

**Skúla- og mentaøkið**

**Skúlaskapurin** fær hølum viðvikjandi framvegis betri umstøður; í summar skuldu 4 nýggir skúlar verið greiðir at taka í nýtslu, tað er í Hvalba, í Gøtu, á Oyrabakka og í Klaksvík, harumframt standa enn fleiri í gerð.

Lógin um fólkaskúlaskipanina er framvegis til umhugsunar og m.a. við umskipan av læraraútbúgvingini fyri eygað verður arbeitt álvarsliga við spurninginum um HF-útbúgving.

Henda útbúgving skal byrja á sumri 1974 og verður løgd so tilrættis, at øll, sum evni og hug hava, kunnu luttaka. Landsstýrið metir tað hava týdning, at hesin undirvísingarháttur fær tilknýti til teir størstu bygdaskúlarnar og miðar ímóti, at so verður.

Vinnulívsútbúgvingin má, skal hon sita í myndini í okkara samfelag, skipast nakað øðrvísi enn aðrastaðni. Tekniskir skúlar til hesa útbúgving eru undir bygging.

Undirvísingarøkið, sum er knýtt at sjóvinnuni, hevur eisini verið fyri broytingum. Kokkaskeiðini hava verið væl vitjað eins og skeiðini í fiskaviðgerð. Hesi hava verið skipað sum ferðsluskeið, ið hava vitjað runt oyggjarnar. Henda útbúgving má, skulu vit liva av fiskaviðgerð, fjøltáttast enn meir. Ein samvirkan millum hesa útbúgving og hana, givin kann verða á sjómannsháskúlanum er hugsandi, eins væl og hugsandi er, at háskúlaútbúgvingin aftur hevur samband við nautisku læruna, sum eisini stendur fyri broytingum.

**Maskinskúlin** hevur í løtuni trupulleikar av læru- og plásstørvi. Landsstýrið vil her framvegis medvirka til at loysa tørvin, hóast skipanin í løtuni er, at skúlin er burturav statsdrivin.

**Húsarhaldsútbúgving** á centralum húsarhaldsskúla tykist ikki vera uppi í tíðini, og arbeiðir landsstýrið tí við at skipa skeið, sum skal ferðast runt oyggjarnar. Slík kunnu rekast í samarbeiði við kommunurnar, sum mangastaðni hava hóskandi hølir til slíka undirvísing.

**Landsbóka- og skjalasavnið** varð í síni tíð projekterað, men er tann ætlanin slept, nú skjalasavnið eftir køna manna metan kann húsast fram í næstu øld í kjallarahæddini í bakteriologisku starvsstovuni.

Nýtt skitsuprojekt fyri bókasavnsbygging er gjørt, tað er minni enn upprunaliga, men skuldi loyst uppgávuna, eisini tá hugsað er um, at landsbókasavnið kemur at virka í tættari samvinnu við Fróðskaparsetur Føroya.

Hetta setur hevur sínar trupulleikar vegna hølistrot og læraratørv, men tað liggur landsstýrinum nógv á hjarta, at tann útbúgving, her er komin í lag, kann halda fram, so partur av lesandi ungdómi okkara kann støðast longri heima.

**Kommunulógin** hevði tað fyri eyga, at talið av kommunum skuldi minka við samanlegging í størri eindir, og onkunstaðni er áhugi fyri samanlegging.

Sambært lógina fara samanleggingarnar fram sjálvkravdar, men birtast kann uppundir við at framvegis verður arbeitt við spurninginum.

Dispositiónsplanir fyri størri øki kunnu gerast í samband við býarskipanarsamtyktirnar, sum gjørdar vóru í 1954, og vildu slíkir hjálpt kommunum at fingið byggilendi til vega. Sum er dregur hvør kommuna sína línu í hesum máli.

Undir henda tátt hoyrir eisini spurningurin um fíggjan av byggilendi og húsabygging í síni heild.

Húsalánsgrunnurin mennist alsamt, og skuldi við teim íløgum, hann nú fær, kunna loyst størri part av uppgávuni, men tað er framvegis fatan landsstýrisins, at loysnin her ikki liggur í, at tey bíligu lánini ikki skulu takast fyrr enn dýr lán standa frammanfyri.

**Frítíðarspurningurin** tekur seg herheima upp eins og aðrastaðni.

Við teim atstøðum nú eru at koma til arbeiðis, eisini tá ein býr á bygd, skuldi ungdómur betri kunna støðast har. Men skal so vera, mugu vit framvegis virka fyri, at frítíðurnar kunnu nýtast á ríkandi og mennandi hátt.

Hallir til ítrótt, mentunarligt og annað frítíðarvirksemi er ein av tættunum í hesi virkan, og verða nú betri møguleikar at fáa reist slíkar. Kundu vit so lagt tað mentunnarliga virksemi — sum t.d. sjónleiks- og musikvirksemi — sum ferðast skal í fyrsta legu, vildi tað havt alstóran

týdning og kundi birt undir, at farið bleiv undir slíkt arbeiði kring landið. Annars arbeiðir landsstýrið við nýggjari frítíðarlóg.

**Lønar- og príslagið — skattingin**

Á arbeiðsmarknaðinum eru vit stórt sæð sloppin undan lemjandi verkfólksósemjum; flestu ívamál og lønarmál eru loyst í samráðingum. Útlit er eisini fyri, at hetta stendur við í 1974.

Allir stættir á landi hava — hóast dýrtíðina — fingið munandi reallønarbatan, og hýrutølini fyri 1971 og 1972 sýna, at fiskimenn innan alla vinnu hava havt eitt verunligt framlop hesi ár sammett við árini frammanundan. Einasta undantakið tykist verða manningarnar á flakatrolarunum, sum vegna vánaligan fiskiskap hava havt afturgongd, men viðurskiftini hjá teim eru til viðgerðar í samband við viðgerðina av allari ískoytisskipanini.

Skattingin er ætlað nakað av teim inntøkuójavnum, í samfelagnum eru, men her gongur ikki altíð eftir vild, ov mong eru, sum sleppa ov lættliga undan, og tyngir hetta byrðuna hjá øðrum.

Landsstýrið hevur framvegis eina teknikaranevnd at arbeiða við hesum málum, og skuldi hon einaferð í vetur kunna givið tilmæli um broytingar og ajourføringar.

Hvat muninum á donskum, hálvdonskum og føroyskum lønum viðvíkur, so eru samráðingar við stjórnina loknar við, at nevnd skal setast, sum skal gera uppskot um skipan av felagsstovni, sum verður samráðingarstovnur fyri alla almenna lønarseting. Ójavni á hesum øki skuldi so um fá ár ikki kunna komið fyri.

Príseftirlitið virkar alsamt, men sum fleiri ferðir nevnt, tá tað eru hækkandi veraldarprísir, sum ávirka okkara prísir, er tað bert vinninginum hjá handilsmonnum, eftirlitið fær arbeitt við.

Landsstýrið hevur nú fingið økt manningina á hagdeildini og givið henni betri umstøður hølum viðvíkjandi. Henda deild skuldi nú verunliga fingið røkt hagfrøðisligt virksemi, og vit vita, at eitt av fyrstu arbeiðunum, sum verða liðugt viðgjørd, er nýggja prístalsgrundarlagið.

Í hesi tingsetu kann hetta mál avgreiðast.

**Samráðingar við donsku stjórnina**

Mong, mong mál av felags áhuga fyri donsku stjórnina og landsstýrið hava verið viðgjørd í teim samráðingum, fram eru farnar.

Og tey eru — sum rímiligt er — støðugt á lofti í tí viðskifti, vit hava sambært stjórnarskipanina.

Umframt tey frammanfyri nevndu úrslitini av samráðingum við stjórnina viðvíkjandi statshospitalsbygging, umsiting av sosialmálum og lønarstovni, skulu nevnast nøkur fá mál, sum heilt ella lutvíst eru loyst:

Vit høvdu rætt til at taka úr tjóðarbankanum likviditetslán upp í 20 mill. kr., bert tey vóru niðurskrivað einaferð árliga, soleiðis at slætt borð var.

Semja er um broyting, so henda treyt fellur burtur. Eftir standa tekniskar samráðingar við føroyskar peningastovnar og ein minni lógarbroyting.

Føroysk frímerki skulu nú fáast á ein ella annan hátt.

Váttað er tað, vit vistu frammanundan, at staturin á ongan hátt leggur seg út í lántøku okkara uttanlands. Tvørturímóti vil hann tekniskt stuðla okkum, tá vit hava tørv fyri at treða fram á lánimarknaði. (Eitt lán uppá 11 mill. kr. er tikið í Sweitz til telefonautomatisering).

Stjórnin vil stuðla at fáa loyst flogmálið á ein hátt, allir partar kunnu taka undir við, og sum kemur okkum uppí flúgving.

Spurningurin um føroyskan meiriluta í íleggingargrunnsins stýri skal viðgerast í samband við endurskoðanina av lógini áðrenn 1975/76.

Støða okkara til EF-spurningin er tikin til eftirtektar, og stjórnin vil av øllum alvi stuðla okkara áhugamál eins og tey hjá hinum fiskivinnutjóðunum í Norðuratlantshavi.

**Veiðurættindi burtur og heima — Samráðingar.**

Føroyska umsitingin og føroyska landsstýrið hava av málsøkjum, sum viðgerast skulu, stórt sæð tey somu, sum stjórnin í einumhvørjum landi hevur, og hóast nøkur av umsitingarøkjum okkara liggja hjá ríkisstovnum, koma málini fyri stóran part eisini til viðgerðar hjá føroysku myndugleikunum.

Hvat ið møguligt er at viðgera hongur fyri stóran part í, hvussu væl mannað liðið er.

Rembingar seinnu árini innan øll tey øki, sum hava lívsáhuga fyri okkum, saman við ynski um sjálvir at luttaka, so langt vit røkka á øllum hesum økjum, mugu — sjálvt um politikkarar, sum óivað ikki eru so haltir, sum teir hinka til, ikki tykjast skilja tað — bera í sær, at umboð fyri landsstýrið eru burturi mangar ferðir árliga í neyðugum embætisørindum.

Skal gera úrdrátt úr nøkrum av teim samráðingum verið hava síðan seinastu ólavsøku.

Við grønlendska landsráðið var í august 1972 gjørdur endaligur sáttmáli um fiskirættindini fram til 1978, tá EF limaskapur Grønlands noyðir okkum at finna aðra skipan enn verandi sáttmála. Samráðingarnar vóru annars førdar út frá javnrættindarstøðuni sum ríkisborgarar, og vóru vit samdir um, at hetta var til fyrimuns fyri báðar partar.

Í august og september fingu vit fyribilssáttmála við íslendingar um framíhjárættindi innan fyri 50 fjórðingamark teirra. Hesi rættindi hava

í løtuni ógvuliga stóran týdning, men sáttmálin kann ikki takast sum hin endaligi, tí nútímansveiðuhættir sleppa ikki framat. Verður sáttmálin ikki bøttur munandi, er útflyting fiskimarksins í Íslandi stórt bakkast fyri føroyskt vinnulív.

Trúgvi fult og heilt, at línuskip kunnu hava hesar leiðir sum grundstøði, men sleppa størri og smærri trolarar ikki framat, kann tað kosta okkum dýrt.

Sum dømi kann nevnast, at best útgjørdu og dýrastu skip okkara møguliga kundu fingið túr seinasta heyst í Íslandi, men sluppu ikki inn.

Landsstýrið roynir aftur í ár at veita teim loyvi at veiða til feskfisk ella saltfisk, men loyvi kundi ikki gevast.

Hesi skip eru nú so illa fyri, at tey møguliga verða seld til Íslands. Hetta er sárt, samstundis sum vit vita, at enn størri og betri útgjørdir bretskir og týskir trolarar framvegis veiða.

Føroyskur trolaramaður nýtti nú um degini orðini, sum Grímur mælti um Kjartan Ólavsson á sinni:

«Heitstórir eru íslendingar,
teir vilja os inni brenna».

Segði honum, at ikki batar at seta ilt ímillum tjóðirnar báðar, sum í stríðnum at finna ta loysn, teimum hvør sær hóskar, mugu rætta hvør aðrari hond. Vit skilja fullvæl trupulleikar íslendinga idag, og skilja at talan er um at verja eina meginreglu (um frystiskip).

Tó rokna vit við, at undantøk kunnu gerast, og at sáttmálin — sum frálíður — kann bøtast, serliga fyri føroyingar, sum hava so avgerandi tørv, sum eingin annar, og sum tó meir enn aðrir hava stuðlað íslendingar í stríði teirra. Sáttmálin við føroyingar varð fingin í lag, tá íslendingar mest høvdu brúk fyri viðurkenning av nýggja sjómarkinum.

So væl vit skilja íslendingar í stríði teirra, rokna vit við, at teir skilja, at okkara áhugamál sum fjarfiskitjóð eru onnur enn teirra, skilja, at loysnir smíðaðar Íslandi ikki eru nýtiligar í Føroyum.

Samráðingar fóru seinasta summar og heyst fram við danir um býtið av laksakvotuni í Grønlandi og um landingarviðurskiftini í Hirtshals. Hartil hava á fleiri fundum verið viðgjørdir spurningar í sambandi við ICNAF- og NEAFC-fundirnar og tær avmarkingar har verða gjørdar.

Á NEAFC-fundinum í London bleiv sildaveiðubannið óbroytt. Hetta týddi í verunleikanum, at vit í stongdu tíðini í 1974 kunnu veiða 11.000 tons, meðan vit í 1973 bert veiddu 8.000 tons.

ICNAF-fundurin gav okkum samanlagt nóg stóra kvotu fyri toskaveiðu á New Foundlandsleiðunum, men vegna vánalig hagtøl er ivi um, hvørt býtið millum tey ymsu økini er tað besta, tó halda vit, at møguleik-

arnir hjá føroyskum skipum eru góðir á øllum teim vanligu leiðunum har.

Í Grønlandi verður avmarkað næsta ár, men lutur okkara er størri enn veiðan seinasta ár, men munandi minni enn árini frammanundan, hvussu her ber til at halda hús, um toluligur fiskiskapur verður, verður áhugavert at royna.

Danmark hevur í felagsmarknaðarmálinum dyggiliga skorðað á at fáa broytt fiskimarks- og fiskirættindapolitikk EF's.

Fyrireikingunum til hetta útspæl eiga vit stóran part í, og halda vit tí, tað er skilagott. Høvuðsinnihaldið er, at øki, sum hava serligan tørv, mugu hava framíhjárættindi hjá sær sjálvum, men skulu eisini sínamillum geva hvørjum øðrum rættindi.

Neyðugar avmarkingar mugu so berast av londum, sum ikki hava fiskivinnu sum høvuðsvinnu.

Tær mest krevjandi samráðingarnar eru tær, sum byrjaðu í Edinburgh seinast í apríl 1973, og sum nú halda fram millum Bretland, Týskland, Frakland, Noreg, Póland og Belgia øðrumegin og Føroyar-Danmark hinumegin.

Frá føroyskari síðu verður miðað ímóti eini fyribilsloysn, sum

1) gevur okkum munandi størri part av tí, sum veiðast kann við Føroyar, enn vit veiða nú,
2) avmarkar fremmanda trolveiðu í føroyaøkinum ógvuliga nógv,
3) gevur línuskipum okkara betri arbeiðsvilkor og størri pláss at arbeiða á,
4) friðar tey øki, serligan týdning hava fyri okkum, tann partin av árinum, hetta er virðismiklasta og
5) forðar fyri at fremmand veiða kann økjast, uttan so at uttanfyristandandi lond, sum ikki fyrr hava veitt undir Føroyum, bróta seg inn í sáttmálan.

Til tess at røkka hesum hevur verið arbeitt við mongum uppskotum, og eru mangar loysnir samanteggjaðar.

Nevnast kann, at loysnin kann koma at vera — um nøkur fæst — at kvotaskipan verður innførd bæði fyri samlaða veiðu og fyri fiskasløg hvørt sær. Øki verða opnað og stongd ávísar tíðir styttri og longri út frá verandi grundlinjum. Skipastøddir verða avmarkaðar og loyvini fyri ymsar veiðuhættir ymisk.

Undir øllum má liggja viðurkenning av føroyskum framíhjárætti.

Skal ikki dylja, at tað er komið stutt áleiðis við hesum samráðingum, og at striltíð hevur gingið. Útlitið er tí ikki hitt besta. Men í hesum talvi — sum í øðrum — eru mangir leikir og heppnast ikki nú, mugu aðrir roynast, og teir eru enn — tá ein hugsar seg væl um — nakrir.

Ein teirra, tó ikki tann ið fyrst liggur fyri, eitur útflyting fiskimarksins.

Tá sagt verður, at hesin ikki liggur fremstur, er tað tí, eg framvegis haldi, at tann loysn, vit hava brúk fyri, er hon, sum gevur okkum tey veiðurættindi okkum tørva, men samstundis gevur minsta møguleikan at gera móttiltøk vend ímóti okkum. Og endaliga hon, sum verður hon sett í verk t.d. í Hetlandi tó gevur okkum møguleika fyri framvegis at veiða har munandi part av tí, vit nú veiða.

Havi fyrr sagt, at tá allir møguleikar eru royndir við samráðingum, er hin lættasti og mest fantasileysi eftir, nevniliga einvíst at samtykkja útflyting fiskimarksins.

Tað er framvegis meting landsstýrisins, at eitt lítið land sum Føroyar eru best vardar av alheimsreglum, og tær mugu verða so háttaðar, at strandalondini eiga avgerandi fyrimun á egnum landgrunni, samstundis sum lond, ið bert liva av fiskiskapi, kunnu varðveita fjarfiskiskap sín mong — mong ár enn.

Stríðið stendur tí ikki um útflyting ella ikki útflyting, men um at nýta tíðina, sum verður at ganga, áðrenn havrættarstevnan møguliga fær skipað nýggj rættarviðurskifti á havinum, á ein slíkan hátt, at hesi sjónarmið um serligan tørv sleppa framat, at menn og lond hava hoyrt tey so ofta og so manga staðni, at pláss verður fyri teim í rættarskipanini.

Mangur sigur, at úrslitið hóast alt verður útflyting yvir ein kamb. Og satt er, at nógv talar í løtuni fyri, at so verður.

Men gerst hetta loysnin, so hava Føroyar tapt, tapt og mist alt tað, sum ikki er møguligt at vinna aftur á okkara egnu leiðum, og tað eru stórar nøgdir, um tað vit vinna, kann fáa nóg so stórt virði.

Skorða vit einvíst á fyri í løtuni at fremja hin lættasta leikin, hvat verður so av hinum spurninginum, sum eftir eru, at fáa aðrar at góðtaka eitt víðari mark, at fáa vart eitt víðari mark.

Kunnu vit vera so inkonsekventir í hesum máli, at vit sum rættir føroyingar gera eina samtykt og síðan lata upp í hendurnar á ønum at seta í verk?

Teir gomlu søgdu:

> «Stórt mót í ongari makt
> kemur mongum í forakt».

Hugsi hetta verður sagt um okkum, velja vit ídag at leypa um tað langa, drúgva og ótakksama samráðingararbeiði. Ja, haldi sjálvur, tað kann sigast av røttum, um vit treða hin lætta vegin, sum er ein tingsamtykt og síðan seta seg at bíða eftir alheimsloysnum.

Hví eru Føroyar í eini serstøðu? Hví hóskar loysnin við einvísari útflyting ikki Føroyum so væl sum ein meira fjøltáttað loysn?

Føroyar eru í hesum máli í stríð við seg sjálvar, her er ikki hugsað um, at politisku flokkarnir eru ósamdir um leiðirnar at ganga, men um, at áhugamálini hjá fjarfiskivinnuni og heimavinnuni eru heilt ymisk.

Flyta vit einvíst út — uttan at royna aðra loysn — má øðrum londum standa greitt, at vit meta hetta vera einastu og røttu leiðina at ganga. Tey kunnu tá við betri samvitsku steingja víðkaðu veiðuøki síni fyri fjarfiskiflota okkara.

Vit hava tá slept møguleikanum fyri at virka fyri teirri differentieraðu — margfaldu — loysnini og hava tá — burtursæð frá einum møguligum samarbeiði við norðanlond og Grønland — nærum bert føroyaleiðirnar sum berandi støði undir øllum føroyskum búskapi.

Vit hava tá:

1) Bundið okkum til eitt avmarkað veiðuøki, sum valla gevur pláss til tey fiskiskip, koma skulu í staðin fyri fjarfiskiskipini.
2) Økt vandan fyri at fiskivinnan fær afturstig, tí hon gerst eintáttað viðvíkjandi veiðuhættum (allir hættir hóska ikki eins væl til hetta veiðuøki).
3) Bundið okkum til eina veiðunøgd, sum vit í løtuni meta liggur millum 100.000 og 120.000 tons av vanligum fiskasløgum.
4) Bundið expansiónsmøguleikarnar til hægri prísir, hægri effektivitet og lítið roynda veiðu sum svartkjafta- og langasporlsveiðu.
5) Troðkað flota okkara inn á eitt øki, sum er ógvuliga merkt av streymi, skiftandi veðurlíkindum og broytingum í fiskastovninum.

Hetta grundarlag er eftir landsstýrisins meting viðbrekið. Væl nýtist ikki at ganga so illa at knívskorið verður fyri fjarfiskiskap, men útflytingar yvirhøvur fara so undir øllum umstøðum at geva okkum ómetaligar trupulleikar.

Samráðingar taka sum nevnt ongan møguleika fyri at flyta út burtur, men kunnu kanska geva fyribilsloysn, meðan útflyting valla gevur nakra loysn beint nú og seinni valla meir enn ta loysn, sum fær alheimsviðurkenning. Vit hava illa ráð at bíða eftir henni, og vildi tí fyribilsloysnin dugna okkum ímeðan.

Felagsmarknaðurin varð í síni tíð, tá farast skuldi undir samráðingar, nærum myndaður sum eitt forneskt fyribrigdi, ein skuldi vara seg fyri at koma í samband við, tí komu vit ikki at fáa boðið óminnisdrykkin og drukku, vórðu vit uttan skil lokkaðir inn í hellið.

Vit hugsaðu tá við honum, navngivið hevur hesa vøku:

«síggja vil eg tað ljóta trøll,
sum eitt vil øllum ráða»

og er tað meting mín, at júst tí vit fingu ta sjón, bar til at geva svarið, givið er viðvíkjandi limaskapstilboðnum. Samráðingarnar settu okkum eisini betri førar fyri at siga frá, hvat okkum — og londum í okkara støðu — ikki líka, og hvørji broytingarkrøv lívsmál okkara treyta.

Latum okkum tí standa sum ein maður um tann leik nú skal fremjast um rættindini á Føroya grunnum. Latum okkum rannsaka og granska veikleikarnar hinumegin borðið. Tá eru vit eisini betri brynjaðir at søkja aðru ferð, skal so verða.

---

Vit politikkarar hava fingið ta ábyrgd við avgerðum okkara at ávirka gongdina í samfelagnum, at broyta ella varðveita, at lætta um dagliga streviið ella leggja neyðugar byrðar á.

Í ynskinum um, at andstøða og stjórnarflokkar mugu hava hegni til at taka hepnar samfelagsavgerðir, fara vit til arbeiðis í nýggjari tingsetu.

---

Hví eru Føroyar í eini serstøðu? Hví hóskar loysnin við einvísari útflyting ikki Føroyum so væl sum ein meira fjøltáttað loysn?

Føroyar eru í hesum máli í stríð við seg sjálvar, her er ikki hugsað um, at politisku flokkarnir eru ósamdir um leiðirnar at ganga, men um, at áhugamálini hjá fjarfiskivinnuni og heimavinnuni eru heilt ymisk.

Flyta vit einvíst út — uttan at royna aðra loysn — má øðrum londum standa greitt, at vit meta hetta vera einastu og røttu leiðina at ganga. Tey kunnu tá við betri samvitsku steingja víðkaðu veiðuøki síni fyri fjarfiskiflota okkara.

Vit hava tá slept møguleikanum fyri at virka fyri teirri differentieraðu — margfaldu — loysnini og hava tá — burtursæð frá einum møguligum samarbeiði við norðanlond og Grønland — nærum bert føroyaleiðirnar sum berandi støði undir øllum føroyskum búskapi.

Vit hava tá:

1) Bundið okkum til eitt avmarkað veiðuøki, sum valla gevur pláss til tey fiskiskip, koma skulu í staðin fyri fjarfiskiskipini.
2) Økt vandan fyri at fiskivinnan fær afturstig, tí hon gerst eintáttað viðvíkjandi veiðuhættum (allir hættir hóska ikki eins væl til hetta veiðuøki).
3) Bundið okkum til eina veiðunøgd, sum vit í løtuni meta liggur millum 100.000 og 120.000 tons av vanligum fiskasløgum.
4) Bundið expansiónsmøguleikarnar til hægri prísir, hægri effektivitet og lítið roynda veiðu sum svartkjafta- og langasporlsveiðu.
5) Troðkað flota okkara inn á eitt øki, sum er ógvuliga merkt av streymi, skiftandi veðurlíkindum og broytingum í fiskastovninum.

Hetta grundarlag er eftir landsstýrisins meting viðbrekið. Væl nýtist ikki at ganga so illa at knívskorið verður fyri fjarfiskiskap, men útflytingar yvirhøvur fara so undir øllum umstøðum at geva okkum ómetaligar trupulleikar.

Samráðingar taka sum nevnt ongan møguleika fyri at flyta út burtur, men kunnu kanska geva fyribilsloysn, meðan útflyting valla gevur nakra loysn beint nú og seinni valla meir enn ta loysn, sum fær alheimsviðurkenning. Vit hava illa ráð at bíða eftir henni, og vildi tí fyribilsloysnin dugna okkum ímeðan.

Felagsmarknaðurin varð í síni tíð, tá farast skuldi undir samráðingar, nærum myndaður sum eitt forneskt fyribrigdi, ein skuldi vara seg fyri at koma í samband við, tí komu vit ikki at fáa boðið óminnisdrykkin og drukku, vórðu vit uttan skil lokkaðir inn í hellið.

Vit hugsaðu tá við honum, navngivið hevur hesa vøku:

«síggja vil eg tað ljóta trøll,
sum eitt vil øllum ráða»

og er tað meting mín, at júst tí vit fingu ta sjón, bar til at geva svarið, givið er viðvíkjandi limaskapstilboðnum. Samráðingarnar settu okkum eisini betri førar fyri at siga frá, hvat okkum — og londum í okkara støðu — ikki líka, og hvørji broytingarkrøv lívsmál okkara treyta.

Latum okkum ti standa sum ein maður um tann leik nú skal fremjast um rættindini á Føroya grunnum. Latum okkum rannsaka og granska veikleikarnar hinumegin borðið. Tá eru vit eisini betri brynjaðir at søkja aðru ferð, skal so verða.

---

Vit politikkarar hava fingið ta ábyrgd við avgerðum okkara at ávirka gongdina í samfelagnum, at broyta ella varðveita, at lætta um dagliga strevið ella leggja neyðugar byrðar á.

Í ynskinum um, at andstøða og stjórnarflokkar mugu hava hegni til at taka hepnar samfelagsavgerðir, fara vit til arbeiðis í nýggjari tingsetu.

---